# Bilar

Nr. 176 • hósdagur • 18. september 2003 • 77. árg.


Fiat Panda 1,2 Dynamic:

## Smart design og praktiskur bilur



*Panda innan. Girstongin er í instrument-panelinum*
*Mynd: Suni Magnussen*

**Hóast vit ikki hava sæð nógv til nýggjar Fiat Panda hesi seinnu árini, hava teir verið framleiddir í 20 ár uttan steðg. Tá so avloysarin endiliga kom, bleiv tað ein nútímans og praktiskur bilur**


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*





*Suni Magnussen frá Bilfríðkan er her við tveimum nýggjum Panda 1,2 Dynamic*
*Mynd: Suni Magnussen*

Gamli Fiat Panda bleiv seldur í nógvum milliónum eindum, og eftir hvussu hesin nýggi Panda sær út, verður hann ikki ein minni "succes". Sum vit síggja á myndunum, er talan um ein lítlan praktiskan familubil, sum samstundis er væl egnaður til býkoyring. Bilurin er væl innrættaður og plássið væl útnyttað, bæði hvat persónum og viðføri viðvíkur. Baksetrið kann flytast, soleiðis at viðførisrúmið kann broytast frá 205 til 230 litrar. Hetta ávirkar sjálvandi plássið hjá teimum ferðandi á baksetrinum. Rygglenið kann eisini stillast í tríggjar ymiskar støður.

Panda er ein nútímans og framkomin bilur í allar mátar. Í fyrstu atløgu fæst hann bert við 1,2 litur bensinmotori við 60 hk. Komandi ár fæst hann eisini við 1,3 litur MultiJet turbodiesel motori við 70 hk. Tá kemur hann eisini at fáast við Duallogic girkassa við automatiskari kobling sum eykaútgerð.

### Á torginum í SMS

Panda er ein tryggur bilur við t.d. seks airbag, framman, í síðunum og windowairbag. Avbrótari er til høgra airbag framman. Kabinan er uppbygd sum eitt trygdarbúr. ABS bremsuskipan við EBD eru standard og EPS skipan fæst sum eykaútgerð, tá fæst hann eisini við ARS (antispinn) MSR (antiblokeringsskipan við niðurgiring) og HBA (bremsuassisent við katastrofu-uppbremsing). Ein brandtrygdarskipan syrgir fyri at hurðarnar ikki eru læstar, og ljósið í kabinuni tendrar, um okkurt skuldi verið áfatt.

Standard útgerðin í Panda er t.d. fløguspælari, el-síðurútar framman, fjarstýrt sentrallás, elektrisk servostýrng, hæddarstilling av ratti og førarasetri. Sum eykaútgerð fæst t.d. Skydome glas-skjótitak, tveir eyka airbag, og airconditíon.

Fiat Panda verður sýndur fram á torginum í SMS fríggjadagin og leygardagin í hesi vikuni, tann 19. og 20. september.



*Hesin Panda hevur tvey sóltak, har annað kann latast upp*

### Fiat Panda 1,2 Dynamic

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,2 litur 4 syl. bensin við 60 hk |
| 0-100 km/t: | 14,0 sek |
| Bensinnýtsla: | 17,9 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 155/80-13 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 354,0 cm |
| Breidd: | 158,0 cm |
| Hædd: | 154,0 cm |
| Eginvekt: | 860 kg |
| Viðførisrúm: | 206-230 litrar |
| Prísur: | kr. 119.600,- |
| Søluumboð | Bilfríðkan<br>Smiðjugerði<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 317300<br>www.bilfridkan.fo |



Mitsubishi Lancer Station Wagon:

## Mitsubishi við nýggjum sportligum stationcar

**Eftir at sølan av Mitsubishi hevur verið fallandi í nøkur ár, sær tað nú út til at vend er komin í. Næstu árini koma nógv nýggj modell á marknaðin. Bilasølan Ivan Johansen Bilar fekk í vikuni ein nýggjan Mitsubishi Lancer Station Wagon**


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*





*Mitsubishi Lancer Station Wagon 2,0 Sport*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyrstu Mitsubishi Lancer komu á danska og føroyska marknaðin fyri 25 árum síðan, tá fingust teir sum sedan, hatchback og stationcar.

Hóast vit ikki hava sæð so nógv til nýggjar Mitsubishi seinnu árini, hava teir eina stóra vøruskrá. Umframt Pajero jeeparnar, hava teir Lancer, Carisma, Galant, Space Star, Space Wagon, og nýggja frítíðarbilin, Airtrek

Í nýggju verkætlanini hjá Mitsubishi er ætlanin at koma við 14 nýggjum modellum til evropeiska marknaðin komandi árini. DaimlerChrysler eiga ein stóran part í Mitsubishi. Umframt ein nýggjan Mitsubishi Colt, ið er komin á japanska marknaðin, er ein heilt nýggjur Lancer komin á evropeiska marknaðin. Hesin Lancer Station Wagon er ein væl gjørdur og elegantur stationvognur við góðum, tryggum og sportligum koyrieginleikum. Bilurin er í sama klassa sum t.d. Toyota Corolla, VW Golf, Peugeot 307 og Opel Astra. Talan er um ein bil sum avgjørt verður kappingarførur í prísi og dygd.

### Comfort og Sport

Lancer fæst í fyrstu atløgu við tveimum motorstøddum, einum 1,6 litur við 98 hk, og einum 2,0 litur við beinleiðis bensininnsprænging og 135 hk. Hvat útgerð viðvíkur fæst bilurin t.d. í Comfort og Sport. Í Comfort útgávuni er bilurin sera væl útgjørdur við t.d. aircondition, ABS bremsum við EBD og skivubremsum á øllum fýra hjólunum, elsíðurútum framman og aftan, fjarstýrdum sentrallási, eisini á trygdarøkinum við airbag framman, í síðunum og gardinairbag, 3-punkts trygdarbeltum við øll sitiplássini, og fimm nakkapútur ið kunnu stillast, elektroniska startsperru og leðurratt og girknøtt.

Í Sport útgávuni er bilurin t.d. senkaður, hevur 16" sportfelgur, sportratt og sportsetur, sterkt tónaðar rútar á síðuni aftan og baklúkuni. Alt hetta er standard og originalt á Sport útgávuni, sum bert kostar 20.000 krónur meira enn Comfort. Lancer bilarnir hava 3 ára garanti ella 100.000 km, tað sum kemur fyri fyrst.

Bilurin verður sýndur fram á bilasøluni Ivan Johansen Bilar, Hoyvíksvegur 63.






*Sterkt tónaðir rútar á síðuni aftan og baklúkuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Mitsubishi Lancer Sport innan. Hvít instrumentir, sportratt og sportsetur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Mitsubishi Lancer Station Wagon 2,0 Sport

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,0 litur 4 syl. 16V og 135 hk |
| 0-100 km/t: | 10,0 sek |
| Bensinnýtsla: | 11,6 km/l |
| Dekkstødd: | 195/50-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 448,5 cm |
| Breidd: | 169,5 cm |
| Hædd: | 148,0 cm |
| Eginvekt: | 1250 kg |
| Viðførisrúm: | 591 litrar<br>1079 litrar (v. baksetrunum niðri) |
| Prísur: | kr. 218.000,- (Sport)<br>kr. 198.000,- (Comfort) |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |

### Golf verður stórseljari



Størsta bilverksmiðjan í Evrpoa, týsku Volkswagen, roknað við at selja yvir 600.000 eindir av nýggja VW Golf komandi ár. Bilurin, ið kemur á marknaðin í heyst, kemur í harða kapping við ein nýggjan Ford Focus og nýggja Opel Astra

*Kelda: Motor Magasinet*

### Fyrra hálvár 2003



Fyrra hálvár 2003 hevði bilasølan, P/F Meinhardt Arge í Havn, ið selur Nissan, Peugeot, Opel og Saab, selt mest bilar, tilsamans 156. Sum einstakt bilmerki var Toyota nr. 1 við 140 bilum og Mazda nr. 2 við 131 bilum

*Kelda: Bileftirlitið*

### Brúktir japanarar best



Eingir aðrir bilar hava so fá brek sum teir japansku, vísti ein brúktbilarapport frá NAF (Norges Automobil Forbund). Bestir vóru Toyota og Subaru. Kanningin var gjørd av umleið 23.000 brúktum bilum á norsku NAF teststøðunum

*Kelda: www.dagsavisen.no*